## – Eg eri CIA-maður

Fyrrverandi danski fólkatingsmaðurin Uwe Jensen, sum er tikin í USA og skuldsettur fyri rúsevnis- og vápnahandil, sigur nú, at hann hevur arbeitt fyri amerikansku fregnartænastuna CIA og amerikansku rúsevnisløgregluna DEA. Tann 66 ára gamli danin sigur, at hann var noyddur at flýggja til Venezuela, tí onkur hevði avdúkað, at hann hevði arbeitt fyri CIA og DEA.

Amerikanska løgreglan tók Uwe Jensen tann 7. november. Sambært løgregluni skuldu hann og nakrir aðrir senda eina stóra nøgd av vápnum til Kolombia. Afturfyri skuldu teir fáa pengar og kokain. Vápnini vóru ætlað einum víðgongdum høgrasinnaðum felagsskapi í Kolombia.

Uwe Jensen sat eitt skifti í Fólkatinginum sum tingmaður hjá gamla Framburðsflokkinum.

## Burtur við tiltøkunum

Enn einaferð hevur ST-aðalfundurin kravt, at USA skal ógilda handilstiltøkini ímóti Kuba. 173 lond atkvøddu fyri kravinum og bert trý ímóti. Londini, sum atkvøddu ímóti, vóru USA, Ísrael og Marshalloyggjarnar. Etiopia, Nicaragua, Malawi og Usbekistan atkvøddu ikki.

Í samtyktini verður heitt á limalondini í ST um ikki at virða ta amerikansku Helms-Burton-lógina, sum bannar samhandli við Kuba. Lógin varð samtykt í kongressini í 1996.

Øll tey fimtan ES-londini atkvøddu fyri uppskotinum, m. a. tí amerikanska lógin roynir at forða útlendskum fyritøkum at hava samskifti við Kuba. 25 sendimenn tóku orðið undir viðgerðini. Tey vildu vera við, at amerikanska lógin er brot á fólkarættin og skaðar kubanska búskapin.

## Samstarv um gass

Russland hevur áhuga í at økja orkusamstarvið við Noreg, og seinni í hesum mánaðinum fer norski olju- og orkumálaráðharrin, Einar Steensnæs, til Russlands at tingast við russar um samstarvið.

Talsmenn hjá norsku oljuvinnuni hava sagt seg hava stóran áhuga í at samstarva við russar. Eitt nú hevur Norsk Hydro longu fingið sáttmála við russiska Gazprom um samstarv í Shtokmanleiðini í russiska partinum av Barentshavinum. Hetta ein ein gassleið, sum er størri enn allar tær norsku gassleiðirnar tilsamans.

Samstarvið um olju og gass var eitt av evnunum, tá russiski forsetin, Vladimir Putin, vitjaði í Noregi í vikuni.

## Arafat skal vísast burtur

Ísraelski uttanríkisráðharrin, Benjamin Netanyahu, sigur, at var hann ísraelskur stjórnarleiðari í dag, hevði hann koyrt palestinska leiðaranum, Yasser Arafat, í útlegd.

Netanyahu, sum eftir øllum at døma fer at royna at gerast forsætisráðharri á komandi valinum í Ísrael, sigur, at tann stjórnin, sum verður skipað aftan á valið, eigur at seta sær sum eitt av sínum fremstu málum at vísa Arafat burtur. Hetta er ikki fyrstu ferð, at Netanyahu hevur sagt sína hugsan, men orðini verða hildin at hava størri týdning, nú hann er uttanríkisráðharri.

Ariel Sharon, forsætisráðharri hevur fleiri ferðir hótt við at koyra Arafat í útlegd, men hevur kortini ikki gjørt tað. Ein orsøk er, at USA ikki vil hava, at palestinski leiðarin verður koyrdur í útlegd.

# Irak fyrireikar seg til kríggj við kemiskum vápnum



*Iraksku tjóðartingslimirnir atkvøddu allir sum ein ímóti at góðtaka krøvini hjá ST, men sambært Bush forseta var hetta bert ein partur av leikinum hjá Saddam Hussein. Tað er kortini hann, sum tekur avgerðina*

*Mynd: Reuters*

**Irak hevur bílagt óvanliga nógvan heilivág, sum verður nýttur til at viðgera fólk, sum hava fingið skaða av kemiskum vápnum**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen*

Meðan altjóða samfelagið bíðar eftir, hvat irakski leiðarin, Saddam Hussein, fer at siga um tey seinastu krøvini frá ST, bendir ymiskt á, at Irak longu er farið at fyrireika seg til kríggj.

Tað er komið fram, at Irak hevur bílagt tvey sløg av heilivági úr Turkalandi. Talan er um eina óvanliga stóra nøgd av heilivági, sum verður nýttur til at viðgera fólk, sum hava fingið skaða av kemiskum vápnum. Men heilivágurin verður eisini nýttur til at viðgera sjúklingar við hjartatrupulleikum, og tí stendur hann ikki í yvirlitinum yvir vørur, sum skulu kannast, áðrenn tær verða seldar Irak.

Blaðið International Herald Tribune sigur seg hava fingið at vita, at irakar hava bílagt eina millión eindir av hesum heilivági, og amerikanskir serfrøðingar siga við blaðið, at hetta er nógv meiri, enn tey iraksku sjúkrahúsini hava tørv á. Serfrøðingarnir siga eisini, at irakska bíleggingin er óvanlig, tí eindirnar eru munandi størri enn vanligt og eru tí neyvan ætlaðar at nýta í vanligum viðurskiftum.

### Bara spæl

Amerikanska stjórnin hevur gjørt greitt, at hon leggur ongan týdning í avgerðina hjá iraksku tjóðartinginum at havna krøvunum hjá ST.

- Hatta er ikki annað enn ein partur av leikinum hjá Saddam Hussein. Tinglimirnir gera, sum forsetin sigur. Har er einki demokrati, men einræði, og handan avgerðin hevur ongan týdning. Vit bíða eftir, hvat Saddam fer at siga, segði amerikanski forsetin, George W. Bush, í gjár.

Amerikanskir embætismenn vænta, at Saddam Hussein fer at góðkenna krøvini hjá ST, tá saman um kemur. ST hevur givið Irak freist til leygardagin at boða frá, um landið góðtekur krøvini ella ikki.

Verður svarið úr Bagdad nei, skal málið fyri trygdarráðið hjá ST.

# Aftur ein upptøka við bin Laden

**Hesaferð rósar bin Laden teimum, sum skipaðu fyri bumbuspreingingini á Bali og teimum, sum rændu gíslarnar í Moskva. Amerikanararnir halda, at upptøkan er verulig**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Arabiska sjónvarpsstøðin Al-Jazeera hevur aftur sent eina bandupptøku við yvirgangsleiðaranum Osama bin Laden.

Í upptøkuni fegnast hann um bumbuatsóknina á indonesisku oynni Bali og rósar teimum, sum skipaðu fyri atsóknini. Eisini fegnast hann um gíslatøkuna í leikhúsinum í Moskva, og hann rósar teimum kekensku gíslarænarunum.

Men bin Laden ávarar eisini. Ikki einans USA stendur fyri skotum, men eisini tey lond, sum arbeiða saman við amerikanarunum.

- Vita stjórnirnar í hesum londunum ikki, at harkaliðið í Hvítu Húsunum eru teir ringastu drápsmenninir í okkara tíð? Hví samstarva við Amerika? Eins og tit drepa, verða tit dripin, sigur røddin á bandinum.

Tann stóri spurningurin er, um tað veruliga er Osama bin Laden, sum tosar á bandinum, men ein talsmaður hjá amerikansku fregnartænastuni CIA segði í gjár, at maðurin eftir øllum at døma er bin Laden.

Er hetta so, so er tað fyrstu ferð síðani tann 9. november í fjør, at amerikanarar hava staðfest, at bin Laden framvegis er á lívi.









